STUTT SAGT

## Teistin ikki til reiðar enn

Teistin, sum bar við land inni í havnini á Gomlurætt hósdagin, verður ikki klárur at sigla aftur fyrr enn miðskeiðis í næstu viku.

Skipið hjá Strandferðsluni, Teistin, fekk hósdagin hol á kúlustevnið og liggur nú á Tórshavnar Skipasmiðju til umvælingar:

– Teistin veður ikki klárur at sigla aftur fyrr enn um nakrar dagar. Umvælingin kundi kanska tikið styttri tíð, men vit ynskja heldur at geva Teistanum ta tíð, tað tekur at gerast 100% klárur aftur, sigur Regin Vágadal, rakstrarleiðari hjá Strandferðsluni.

Strandferðslan hevur sett Ternuna at sigla fyri Teistan.

**- horsdal**

## Einki russiskt í Hoydølum

Ov fá hava valt russiskt á Studentaskúlanum í Hoydølum næsta skúlaár. Tískil hevur skúlin gjørt av, at lærugreinin ikki verður á tímatalvuni næsta ár.

Tá avtornaði vóru bert sjey næmingar, ið høvdu valt russiskt. Og sambært leiðsluni á skúlanum er tað ov lítið:

– Tað eru somuleiðis altíð nøkur, ið fella frá. Og tískil loysir tað seg ikki. Men tey, ið valdu russiskt í fjør, halda sjálvandi fram við russiskum eitt ár afturat saman við læraranum André Niclasen, sigur Anna Djurhuus, skrivstovukvinna á Studentaskúlanum í Hoydølum.

**- horsdal**

## Rútur knústur í Havn

Um klokkan eitt í leygarnáttina varð herverk framt á Handilskjarnan. Tríggir mans knústu ein stóran handilsrút og runnu síðan avstað.

Bert hálvan tíma seinni varð ein rútur somuleiðis knústur í Litaval í J.C. Svabosgøtu:

– Alt bendir á, at tað eru teir somu menninir, ið hava knúst báðar rútarnar. Vit vita, hvørjir teir eru, og teir verða skuldsettir fyri herverk, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í Havn.

**- horsdal**

## Bilur stolin í Havn

Leygarmorgunin varð ein bilur stolin í vesturbýnum í Havn. Bilurin var ein grønur Toyota Corolla og varð stolin á Heiðaskáki. Bilurin varð funnin seinni á degnum í Kollafirði og hevði fingið stóran skaða:

– Viðkomandi, ið átti bilin, hevði gloymt lykilin eftir í bilinum. Tí er tað ikki vist, at tryggingin dekkar tann skaðan, bilurin hevur fingið, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í Havn.

**- horsdal**

## Tvíburar í barrini



Tær báðar tvíburasystrarnar, Maria og Kristina, sum millum annað hava prýtt forsíðuna á Ð, verða millum teirra, sum skulu syrgja fyri einum góðum ungdómstúri hjá Norrønu, tá lagt verður frá landi tann 26. juni.

Tær báðar verða sonevndar Tequila Twins á ferðini, har tær kring barrina fara at ganga við sínum skot-bakka. So kanska fleiri av luttakarunum á túrinum nýta høvi til at fáa sær eitt skot ella kanska tvey.

Hartil verður eisini nógv undirhald av ymsum slag á skránni. Salsa-dansur og kick-boxing teljast millum meira óvanligu fyribrigdini, og vyri tónleikinum syrgja Showmenn, David (C21), Páll finnur Páll, 200, Skunk og onnur fyri.

**-mørk**

# Fylgja við HM á opnum havi

**Hjúnini Anthony og Monique Browne úr Englandi sigla hvørt summar kring alt Evropa við stuttleikabátinum hjá sær. Men hetta forðar teimum ikki í at fylgja við HM, sum í hesum døgum er í Týsklandi.**

MENTAN
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*



*– Heimurin er ikki so stórur. So sjálvandi frætta vit øll úrslitini frá HM, hóast vit sigla á opnum havi í fleiri vikur, sigur Anthony.*

– Heimurin er ikki so stórur. So sjálvandi frætta vit øll úrslitini, hóast vit sigla á opnum havi í fleiri vikur, sigur Anthony.

– Vit royna at fylgja við øllum dystunum hjá Englandi. Higartil hevur Englandi ikki spælt nøktandi, men vónandi fer tað at ganga betri. Týsdagin spæla teir móti Svøríki. Tað verður ein trupul dystur hjá venjaranum hjá Englandi – Svend G. Eriksson. Hann er jú svii, og týsdagin skal hann vinna á sínum egna landi fyri England. Tað verður óivað hart hjá honum, leggur Anthony afturat.

Anthony og Monique komu til Føroya seinnapartin í gjár og verða í Føroyum í nakrar dagar. Eftir hetta sigla tey víðari til Íslands við stuttleikabátinum:

– Um veðrið verður gott í Føroyum næstu dagarnar, verða vit her til týsdagin. Tí so sleppa vit at síggja dystin millum Englang og Svøríki á stórskíggja á eini café í Føroyum. Tað hevði verið framúr, sigur Anthony at enda.

# Løgreglan: Trampolinir eru hættisligar



Trampolinir eru í løtuni sera væl dámdar. Fleiri og fleiri trampolinir eru at síggja á grasvøllunum, nú summarið av álvara er byrjað.

– Men um tær ikki verða nýttar við skili, eru tær sera hættisligar, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í Havn.

Uttan fyri Margarinfabrikkina í Havn er ein stór trampolin. Um vikuskiftið datt ein drongur av trampolini og fekk skaða í ryggin. Drongurin fekk illa anda, megnaði ikki at ganga sjálvur og noyddist at fara á sjúkrahúsið við sjúkrabilinum:

– Vit hava hoyrt um fleiri skaðar á trampolinum higartil í ár. Um tær ikki verða nýttar á rættan hátt, eru tær vandamiklar, sigur vakthavandi á løgreglustøðini.

**- horsdal**

# Martin Joensen syngur á Summar Festivalinum

**Ein av bestu føroysku sangskrivarunum í nýggjari tíð fer at framføra allar sínar kendu sangir á Summar Festivalinum**

SUMMAR FESTIVALUR
*Tíðindaskriv*

Vestmenningurin Martin Joensen hevur skrivað eina øgrynnu av góðum sangum, sum føroyingar kenna og hava tikið til sín. Tann gamli Svarti Ravnur er bara tann fyrsti í eini langari røð av hittum, sum Martin Joensen hevur gjørt, sungið og spælt.

Útgávurnar hjá Vestmonnum í 80'unum vóru tiltiknar, og har hevði Martin ein týðandi fingur við í spælinum. Seinni hevur hann givið tónleik út á sololfløgum, og har hevur eyðkendi stílurin hjá Martini livað víðari.

Sangir sum Morgun, Ró, Pengar, 60'ini, Eg havi tað gott og nógvir, nógvir aðrir eru komnir burtur úr sangskrivingini hjá Martini, og tað er ein perlurøð av fólksligum poppsangum, sum Martin trívur í, tá ið hann fer á pallin saman við sínum bólki.

Ein ummælari skrivaði eftir eina framførslu í fjør, at Martin Joensen er eitt tónleikaligt flogvít, sum kann metast sum ein føroyskur Bob Dylan. Sangirnir, sum hann hevur skrivað, eru ein sannur dýrgrípur, vildi ummælarin verða við.



*Talan verður um ein av fólkakærastu sangarum okkara, sum fer á pallin, nú Martin Joensen verður partur av Summar Festivalinum*

Og hendan dýrgrip sleppa fólk at uppliva á Summar Festivalinum í ár.